# Dystir um vikuskiftið

## Formula-deildin

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 23.06 | VB/Sumba-NSÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 24.06 | Skála-GÍ | Rúni Gaardbo |
| 24.06 | B71-AB | Eiler Rasmussen |
| 24.06 | B36-AB | Dagfinn Olsen |

### 1. deild

| | | |
|---|---|---|
| 23.06 | LÍF-ÍF | Lars Müller |
| 23.06 | TB-B68 | Høgni Hansen |
| 23.06 | HB-NSÍ | Eugen Voda |
| 23.06 | B36-SÍ | Jóannes Mikkelsen |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | B36-EB/S | Thorvald Petersen |
| 24.06 | Fram-Skála | Jóhan Petur Michelsen |
| 24.06 | KÍ-GÍ | Berint Andreasen |
| 24.06 | FSV04-MB | SÍ |
| 24.06 | ÍF-B68 | Jan á Líðarenda |

### 1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 24.06 | KÍ-EB/S | Bjarki Danielsen |
| 24.06 | GÍ-AB | Alex Troleis |
| 24.06 | NSÍ-B36 | Andrias Josephsen |

B36 – EB/Streymur:

# Slagið um oddin er eitt slag um miðvøllin



**Trý stig skilir tey bæði liðini, sum hittast í Gundadali sunnudagin. Bæði eru tey sterk í verjupartinum og kvik í skiftinum frá at vera í verjustøðu til at leypa á. Tískil fær miðvøllurin ein sentralan leiklut í dystinum, og liðið sum vinnur miðvallarslagið stendur eftir sum vinnari**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Lagt er upp til eitt brak av einum dysti, tá B36 og EB/Streymur hittast í Gundadali sunnudagin. Liðini hava fylgst rímiliga væl higartil, men EB/Streymur hevur munin við trimum stigum. Við einum sigri sunnudagin kann B36 gerast ájavnt í stigum við felagsliðið úr Sundalagnum, og tá málúrtøka teirra hvítu er betri, so fara hesir framum EB/Streym, um sigurin kemur í hús. Tískil er ein sigur hjá B36 neyðugur, um teir ikki

## Við - ikki við

**Skaddur:** Dion Jacobsen (knæðskaði)
**Við aftur:** Vagnur Mohr Mortensen (frá HB), Allan Mørkøre (frá B36)

**Allir tøkir**

**Skaddur:** Hanus Clementsen (knæðskaði)
**Við aftur:** Gudmund Nielsen (frá NÍF)

**Leikbann:** Ronnie Samuelsen
**Ikki tøkur:** Sorin Anghel (burturstaddur)
**Ivasamur:** Arnbjørn T. Hansen (fótskaði)

## Málveits

Hóast jóansøkan er á Tvøroyri, so líkist tað einum festligum forsmakki, tá VB/Sumba klokkan 13 leygardagin tekur ímóti NSÍ. Seinastu tíggju árini hava liðini spælt 11 ferðir í Vági, og til samans eru 40 mál skotin í hesum dystunum. Hartil kunnu heimaáskoðararnir eisini fegnast um, at teirra lið hevur vunnið seks av teimum 11 uppgerðunum. Á talvuni sæst, hvussu mótstøðuliðini í 14. umfarinum av Formula-kappingini hava staðið, tá tey hava dystast innanhýsis í bestu deildini seinastu 10 árini.